KRIS

fyribyrging – kunning - undirvísing

30.05.2023

## Góðu foreldur

Vit hava í dag verið inni í flokkinum hjá barni tykkara og undirvíst um fyribyrging av kynsligum ágangi. Heitið á undirvísingini er *Kroppurin er mín,* og hava vit undirvíst í hesum 4 evnunum:

***Um rættindi***

Um næmingar kenna síni rættindi, er lættari hjá teimum at halda fast í, at hesi verða hildin. Somuleiðis hava tey betri førleika at seta egin mørk, virða mørk hjá øðrum og at søkja sær hjálp.

***Um kenslur***

Um børn læra at seta orð á sínar kenslur, gerast tey betri til at handfara og handla hóskandi eftir kenslunum. Børn læra at seta orð á kenslur í góðum relatiónum, saman við nærverandi vaksnum, ið lurta og eru innlivandi.

***Um mørk***

Um børn læra um og kenna síni egnu mørk, duga tey betri at síggja og virða mørk hjá øðrum.

***Um rættin til egnan kropp***

Hesin partur handlar um rættin at ráða yvir egnum kroppi og um kynsligan ágang. Endamálið er, at menna vitan og kunnleika um evnið, so tey duga betri at handfara støður, í samband við mørk og ágang.

Um tit hava spurningar viðvíkjandi undirvísingina, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við okkum.

Vinarliga

Malan Kjærbo, sosialráðgevi
malan@kris.fo

Sigvør Gregersen, námsfrøðingur
sigvor@kris.fo

Á Kneysum 6, 650 Toftir    tlf.: 44 88 81    teldupostur kris@kris.fo